Tá ein vakstraravtala verður gjørd fyri at skapa búskaparvøkstur í einum øki, er privata initiativið avgerandi. Ein vakstraravtala tekur tí støði í, at privata vinnan skal hava ein sentralan leiklut í avtaluni. Longu frá byrjan av skal privata vinnan tí uppí leikin og vera við til at forma avtaluna, soleiðis at hon finnur sín leiklut í avtaluni. Á sama hátt skulu møguligar útlendskar fyritøkur eisini vera við í avtaluni og mugu tí eisini vera við frá byrjan av.

Tað eru sostatt nógvir partar í eini vakstraravtalu, men teir mest týdningarmestu partarnir eru kommunurnar og landið. Skal ein vakstraravtala kunna gera nakran veruligan mun, krevst ein sterkur vilji frá landi og kommunum.

*(Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur og Magni Laksafoss, búskaparfrøðingur um vakstraravtalur)*

Hesi øki (Suðuroy og Sandoy, blaðm) eru í bygnaðarligum trupulleikum - tað kunnu vit øll verða samd um. Men at gera økini til kreppurakt øki er ikki rætt! Tí mæli eg...... øllum til at handfara hesar trupulleikar sum bygnaðarligar avbjóðingar og ikki sum eina kreppustøðu.

*(Jóannes Eidesgaard, løgmaður, í svari upp á fyrispurning frá Óla Breckman í august 2005)*

# Nógv arbeiði í Suðuroy fær



**Í løtuni er arbeiði til allar hendur í Suðuroy og tað fær nógvar politikarar at leggja seg aftur á og halda, at nú stendur væl til. Men tað er ein hættislig støða, tí veruleikin er, at tað stendur alt annað enn væl til í Suðuroy, siga samfelagsfrøðingurin, Jógvan Mørkøre og búskaparfrøðingurin, Magni Laksafoss**

VAKSTRARAVTALA FYRI SUÐUROY

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Suðuroyggin er ikki longur í kreppu. Men hon hevur framvegis stórar trupulleikar.

Tað staðfesta teir báðir, Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur og Magni Laksafoss, búskaparfrøðingur.

Í tvey ár hevur verið tosað um at gera eina miðvísa ætlan fyri, hvussu gongdin í Suðuroy kann vendast, so at fólkaminking verður vend til fólkavøkstur og so at suðuroyingar við útbúgving eisini kunnu fáa eina framtíð í oynni.

Kommunur og vinnulív í Suðuroy heitti á vári í 2005 á Jógvan Mørkøre og Magna Laksafoss um at leggja eitt slíkt arbeiði tilrættis.

Teir halda, at besti framferðarháttur, er, at allir partar, vinnulív, kommunur í Suðuroy og landið, ganga saman um eina beinleiðis vakstraravtalu.

Grundarlagið undir eini slíkari avtalu, er, at ein kanning verður gjørd fyri at vita, hvørji vinnulig, dentur skal leggjast á at menna í Suðuroy.

- Tað hevur ómetaligan týdning, at talan er um eina ætlan, sum tað letur seg gera at seta í verk. Tað merkir, at vit skulu finna eini fýra, fimm vinnulig tyssi, sum tað er hóskandi at leggja seg eftir at menna í Suðuroy.

## Hava start seg blindar

Men enn gongur ongan veg við ætlanini at seta hesa vakstraravtaluna í verk.

- Tað sær út sum at politikarar hava start seg blindar upp á, at tað er nóg mikið av arbeiði til allar hendur í Suðuroy og at teir tí ikki halda, at tað er neyðugt við eini vakstraravtalu.

Men her eru samfelagsfrøðingurin og búskaparfrøðingurin alt annað enn samdir.

- Hóast kreppan er av, hevur Suðuroyggin framvegis stórar bygnaðarligar trupulleikar, sum ongin hevur gjørt nakað fyri at loysa. Fólkatalið minkar alsamt og teir suðuroyingar, sum fáa sær eina útbúgving, eru dømdir til eitt lív í útlegd. tí í Suðuroy eru alt ov fá størv til fólk við útbúgving.

- Sostatt er Suðuroyggin í einum ringari ringrás og høvuðsavbjóðingin verður at venda teirri gongdini og skapa arbeiði til fólk, sum hava hug at flyta aftur í oynna at búgva, so at fólkatalið veksur aftur.

- Gerandisdagurin er kanska ikki longur so nívandi, sum tá ið arbeiðsloysið var stórt, men útlitini fyri framtíðina eru framvegis døpur, tí tað eru alt ov fá arbeiðspláss til teir mongu suðuroyingar, sum fáa sær útbúgving.

Tí ávara serfrøðingarnir ímóti, at politikarar stara seg so blindar upp á, at er nógv arbeiði, at teir ikki síggja teir stóru, bygnaðarligur trupulleikarnar, sum Suðuroyggin er í.

- At skapa arbeiðspláss til hesi fólkini, er altavgerandi fyri at fáa vent gongdini og fáa vøkstur aftur í Suðuroy.

- Men tað kann slást rimmarfast, at onki av tí, sum hendir í løtuni, er tekin um, at vøkstur er við at verða skaptur, tí skal annað og meiri til, fyri at venda gongdini.

## Neyðugt við bindandi avtalu

Í hesum sambandi snýr tað seg um at finna útav, í hvørjum vinnum tað ber til at skapa vøkstur. Men tað er eisini neyðugt at allir partar avtala, hvussu vit skulu menna hesar vinnurnar.

Tað er júst endamálið við eini vakstraravtalu, at allir partar binda seg til at seta tey tiltøk í verk, sum semja er fingin um.

- Tað eru nógvar kanningar og frágreiðingar skrivaðar um støðuna í Suðuroy og tað er onki endamál í at skriva eina afturat.

- Nú ræður um at leggja eina miðvísa ætlan og endamálið við eini vakstraravtalu er ikki at veita kreppuhjálp.

Hinvegin líkjast tey 10 boðini, sum landsstýrið kom við á sinni, eini kreppuhjálp, sum kundi loyst ein bráðkoman trupulleika.

Men tað, sum er avbjóðingin, er at finna langtíðarloysnir, sum kunnu venda skeivu gongdini.

Í hesum sambandi halda teir báðir serfrøðingarnir, at besti framferðarháttur er at finna nøkur vinnulig tyssi, sum tað er vert at leggja dent á.

- Ì hesum sambandi skulu vit finna tey vinnuligi tyssi, har vit halda, at møguleikin er størstur fyri at skapa vøkstur í nýggjum størvum.

Kommunurnar í Suðuroy hava samtykt at fara undir hesa ætlanina. Í fyrstu atløgu settu kommunurnar í Suðuroy og landskassin 250.000 krónur av í part til at kanna, hvørji vinnulig tyssi, vit skulu leggja okkum eftir at menna í Suðuroy.

- Ætlanin var so, at hesar 500.000 krónur skulu brúkast til at kanna eftir, hvørjar vakstrarvinnur kunnu koma upp á tal í Suðuroy.

Hetta er ein tilgongd, har endamálið er, at bæði vinnulív og politikarar í Løgtingi og í kommununum frá fyrsta degi, verða við á kanningarferðum og eru við til at finna útav, hvørji vinnulig tyssi, dentur skal leggjast á.

- Fyri hesar 500.000 krónurnar, skulu vit hava funnið nøkur hóskandi, vinnulig tyssi og allir partar skulu hava undirskrivað eina avtalu um at seta hesi tyssini í verk.

Teir báðir siga, at sostatt er tað misskilt, tá ið politikarar siga, at vit skulu fyrst gera eina kanning og síðani skulu politikarar og vinnulívsfólk meta um kanningina og semjast um at seta hana í verk.

## Ein sólskinssøga

Teir báðir siga, at slíkar vakstraravtalur eru gjørdar aðrastaðni, og summastaðni hava tær eydnast avbera væl.

- Okkara arbeiði er at kanna eftir úti um heimi fyri at vita, hvussu slíkar avtalur hava eydnast aðrastaðni.